# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

# Natasha Bedingfield kemur til Føroya

**G!Festivalurin kunnger í dag høvuðsnavnið, ið er einki minnið enn ein poppsensasjón. Natasha Bedingfield kemur til Føroya**

TÍÐINDASKRIV



*Hendan kvinnan verður at hoyra á G!*

Hon eigur mest spælda sangin í amerikanskum populer-útvarpi í 2006 er fastur gestur á MTV, Brit Awards og Grammy-hátíðunum og er í løtuni á konsertferð við Justin Timberlake. Um fáar vikur stendur Natasha Bedingfield á palli á G! Festival, sum størsta aktuella poppnavn nakrantíð í Føroyum, skrivar festivalurin á heimasíðu síni í morgun.

Við superhittum sum »These Words«, »Unwritten«, »Single« og »I wanna have your babies«, (sum í løtuni eisini er á 15 teimum bestu) hevur Natasha Bedingfield lagt lurtaraskaran báðumegin Atlantshav fyri føtur sínar og vunnið sær støðu millum fremstu poppstjørnur í heiminum.

Í løtuni er Natasha Bedingfield á konsertferð saman við Justin Timberlake. Og dagin eftir, at hon hevur spælt á Syðrugøtusandi, fer hon við leiguflogfari til Onglands at spæla »On the beach« í Bristol saman við Maroon 5, Akon og Mika.

»Natasha Bedingfield er tað størsta navnið, vit higartil hava havt á G!, og vit eru bæði errin og takksom fyri at kunna bjóða Føroya fólki eina slíka bjarta og aktuella heimsstjørnu,« sigur Jón Tyril, talsmaður hjá G! Festival við heimasíðuna.

Natasha Bedingfield syngur um tað, sum upptekur hana. Hennara egnu meiningar, ynski og tankar eru tað, hon leggur røðd til.

Hon vaks upp í einari serstakliga musikalskari familju og byrjaði longu sum blaðung at skriva egnar sangir og framføra saman við systkjum sínum, og skjótt gjørdist greitt, at tónleikurin átti og mátti vera yrkis- og lívsleið hennara. Eftir eina tíð sum sangari og sangskrivari í kristiliga bólkinum The DNA Algorithm, skrivaði hon í 2003 undir plátusáttmála við Sony Music. Síðani hevur tað gingið slag í slag við hennara altjóða sigursgongd.

**Almenna heimasíðan:**
natashabedingfield.com/

**Natasha á MySpace:**
myspace.com/
natashabedingfield



*Hesin kemur kortini ikki á Fjarðafestivalin*

# Brian Littrell gav avboð

**Backstreet Boys stjørnan Brian Littrell, ið var stóra høvuðsnavnið hjá Fjarðafestivalinum, hevur givið avboð. Fyrireikararnir eru skelkaðir, og umhugsa endurgjaldskrav, men avloysarin er funnin í rokkbólkinum Pillar**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

– Vit hava arbeitt í yvir eitt ár við at fáa Bran Littrell á okkara festival, og kundu fyri einum hálvum ári síðan kunngera, at hann kom. Sáttmálin er skrivaður og pengar eru fluttir til hansara, og so meldar hann avboð nú, sigur Eyðun Jacobsen fyriskipari av Fjarðafestivalinum.

Hann viðgongur, at hetta kemur sera illa við, og at festivalurin hevur roynt, at fáa Littrell til at broyta avgerðina. Men hetta er tíanverri ómøguligt.

– Arbeiðið við eini komandi Backstreet fløgu er seinkað, og tí fellur Fjarðafestivalurin saman við útgávukonsert hjá teimum í Kanada, og hetta er ómøguligt at broyta. Men tað er greitt, at hetta er sáttmálabrot og ræðuliga keðiligt, sigur Eyðun Jacobsen, og vísir á, at Fjarðafestivalurin nærum heilt víst fer at krevja endurgjald frá Littrell.

Síðan boðini bórust hevur Fjarðafestivalurin arbeitt dag og nátt fyri at broyta avgerðina ella fyri at finna ein hóskandi avloysara, og vit kunnu nú avdúka, at progressivi amerikanski rokkbólkurin Pillar kemur í staðin.

– Hetta er eitt sera stórt kristið tónleikanavn, liggur í stíli eitt sindur við P.O.D., men eru í løtuni betur enn P.O.D. Vit fingu jú eisini herfyri avboð frá EXTOL, og Pillar er eisini avloysari fyri EXTOL. Fyri okkara málbólk á Fjarðafestivalinum er Pillar eitt sera stórt navn, greiðir Eyðun Jacobsen frá og vísir á, at tey enn arbeiða við møguleikanum at finna onkran annan á skránna, ið liggur tættari við Brian Littrell í stíli, men í løtuni er einki avgjørt.

Tilber at hoyra tónleikin hjá Pillar á pillarmusic.com ella á myspace.com/pillar.

# Messel hitaði upp fyri Beach Boy

**Tá Brian Wilson úr Beach Boys vitjaði í Danmark leygardagin, á síni konsertferð kring Evropa, var upphitingin føroysk. Tað er Messell, ið slapp at hita áskoðararnar til Beach party**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*Terji Messell hitaði upp fyri Beach Boys á konsert í Norðurjútlandi*

Einasta konsertin í Danmark hjá Brian Wilson úr Beach Boys varð í Skovdalen í Aalborg leygarkvøldið, og Norðurjútland er økið har Messell hevur gjørt mest vart við seg seinastu árini. Terji Messell er kendur á føroyska tónleikapallinum úr bólkinum Tvass fyrst í nítiárunum og sum helvtin av bólkinum Maður:Glotti í seinnuhelvtavnítiárunum. Men seinnu árini er tað mest sum einstaklingur í verkætlanini Messell, at vit hava kunna uppliva Terja Messell.

Upphitingin fyri Brian Wilson var onnur framførslan hjá Messell leygardagin. Seinnapartin luttók hann á einum promo tiltakið fyri Nibefestivalin í miðbýnum í Aalborg beint við John Bull Pub.

Messel hevur fingið eitt sonevnt podcast á tónleikasølusíðini iTunes, hetta verður dagført hvønn mánað við nýggjum sjónbandaløgum. Um tú meldar teg til á iTunes ber til at skriva Messell í leitirútin, síðan ber til at taka sjónbandaløgini niður av netinum ókeypis. Annars liggja sjónbandaløgini á youtube.com/sufmusic